

*Fráfaringarfagnaður umborð á Gaiu eina summarnátt í Keypmannahavn*



# 1975

## var árið, tá Gaia varð bygd í Bretlandi. Hon er ein 35 føtur Nicholson glas-trevjabátur við einari mastur.



*Hetta er ikki fyrstu ferð, at Durita Joensen er á langfaraleið. Eitt nú sigldi hon í við Duritu Holm umborð á Salku Valku úr Gibraltar til Føroyar í 1999.*

### Lært at navigera

Ætlanin er at sigla runt millum oyggjarnar í Caribiska havinum í nakrar mánaðir. Av tí, at tað bert ber til at sigla tvørtur um Atlantshavi eitt ávíst tíðarskeið á árinum, í sessongini, sum tey rópa tað, ræður um at passa sær løgir.

– Skal eg yvirum aftur í somu sessong, má eg avstað aftur longu í mai. So tað kann væl vera, at eg verið liggjandi haryviri eina sessong afturat, og so verður túrurin longdur til tvey ár. Ella onkur annar siglir Gaiu til Europa. Tað veit eg ikki enn, sigur Durita, sum hevur nomið sær nakað av útbúgving, so hon er før fyri at sigla millum mongu skerini í oyggjahøvunum, sum ætlanin er at vitja.

– Eg havi tikið tað, sum verður rópt lítlu dugnaskapsroyndina og so eitt VHF-radioskeið. Hetta verður mett at vera minstamark fyri lærdóm ein slíkan túr, sigur Durita, sum tó viðmerkir, at tað eru ongi lógarkrøv til fólk, sum sigla bátar undir 15 metrar. Men flestu lond fara helst í næstum at seta ávís útbúgvingarkrøv í verk til hendan siglingarbólk.

### Tumlaði vestur um hav

Men hvaðani stavar áhugin fyri at sigla? Duritu forklárar, at fyrsti neistin varð tendraður longu í 1988, tá hon »tumlaði« tvørtur um Atlantshavið við fimm ymsum kjansum. Hetta letur seg gera, um ein bjóðar seg fram sum manning umborð á einum av mongu bátunum, sum liggja við kaj ymsa staðni í heiminum.

Í 1999 var Durita Joensen manning umborð á Salku Valku hjá Duritu Holm úr Gibraltar til Føroyar.

Síðan hava siglingarferðirnar verið mangar, eftir at hon og møðgurnar Turið og Randi Holm keyptu Gaiu fyri fimm árum síðani. Bæði her í Føroyum, í Svøríki og kring um í Danmark.

### Lívið, sum siglir framvið

Um nakrar dagar leggur Durita frá landi móti heimsins ævintýrum. Og vinkonurnar kring lítla borðið eru bæði spentar og áhugaðar hennara vegna. Tær spyrja, flenna og droyma saman við henni. Og fleiri sita eftir við einari kenslu av sorgblídni um lívið, sum siglir framvið, og longsli eftir at vera eitt lítið sindur meira »Durituslig«: Djørv, sterk, málrættað og ævintýrahugað.

Og jú, kanska onkur teirra fer til Gran Canaria á vitjan umborð á Gaiu í heyst!

rigmor@sosialurin.fo




## Leiðin hjá Gaiu

**Farið verður úr Danmark til Skotlands og suður gjøgnum Biskaya víkina, framvið sponsku og portogisisku strondini til Madaira, Canarisku oyggjarnar og suður til Cap Verde (sum í veruleikanum eita Grønhøvdaoyggjar!).
Síðani vestur um hav til Caribiska oyggjahavið, Trinidad, Tobaco og norðureftir til British Virgin Islands, út til Bermuda og yvirum til Azorurnar og hagani til Europa aftur. Roknað verður við, at tað tekur umleið tveir mánaðir at sigla tvørtur um Atlantshavið.**